# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Stund at semjast

Tað tykist, sum Javnaðarflokkurin og Tjóðveldi í býráðnum í Havn nú eru vorðin so mikið samd, at samgongan nú fer til verka. Kunngjørt er samstarvskjal, har greitt verður frá teimum týdningarmestu málunum hetta til 2012. Tey evni, sum ítøkiliga standa ovast á breddanum, eru byggingin av fimleikarhøllini í Gundadali, skúli á Argjum, musikkskúlin og útvegan av grundstykkjum. Her eru eisini nakrar politiskar útmeldingar og boðað verður frá, at tað skal vera gott at búgva í kommununi og at fíggjarligt skynsemi skal havast í næsta valskeiði. Hetta er sjálvandi hugaligt hjá borgarunum at lesa, hinvegin vildi tað verið heilt óhugsandi, at ein samgonga hevði lagt út við politiskum útmeldingum, sum søgdu tað øvugta.

Tað liggur nú ikki sørt av álvara í hesum. Meirilutin ger vart við, at ansast má eftir, at ein ikki byrjar eina kreppu. Hetta skal helst skiljast so, at meirilutin ikki ætlar at gera sama mistak sum landsstýrið, nevniliga at høgga bremsurnar so hart í, at alt steðgar upp. Við at bremsa og fremja stórar niðurskurðir undir heitinum sparingar, kann tað almenna soleiðis styrkja tær neiligu kreftir, sum elva til fíggjarliga og búskaparliga kreppu. Býráðið í høvuðstaðnum er sera væl fyri fíggjarliga og kann loyva sær at reka ein ekspansivan politikk uttan, at hetta nervar fíggjarligu støðuna. Galdførið er gott og lánsmøguleikarnir tykjast eisini sera góðir. Tað kann tí staðfestast, at býráðsamgongan við byrjan av samstarvinum sendir eitt jaligt signal til borgararnar, eitt signal, sum kann verða við til at halda mótinum uppi hjá fólki, nú alt tykist ganga skeiva vegin og búskaparligir trupulleikar rúgva seg upp úti sum heima.

Aðrar áhugaverdar raðfestingar eru í avtalaða politikkinum. Her eru ætlanir fyri útjaðaran, ið skulu tryggja borgarunum har betri ferðasamband og størri útboð av grundøkjum. Ikki óvæntað er ætlað at gera nakað við miðbýin, sum skal verða ein livandi býarpartur, og Vágsbotnur og Tórsgøta skulu mennast mentunarliga. Ætlanin er at hava ein samskipaðan ungdómspolitikk, soleiðis at Hoyvíkin, Kollafjørður og Eysturbýurin fáa betri møguleikar í frítíðini. At enda verður lovað betri gjøgnumskygni, soleiðis at kærur og umsóknir verða svaraðar beinanvegin, samstundis sum kommunan fer at kunna um alt virksemið umvegis heimasíðuna.

Samantikið ein áhugaverdur og visjonerur býráðspolitikkur, sum allir flokkar ivaleyst kunnu taka undir við. Skal hesin politikkur hava nakran møguleika, mugu samgonguflokarnir nú semjast um leiðsluspurningin og leggja opna klandrið burtur. Hetta áhaldandi stríðið styrkir ikki um álitið millum borgararnar og gagnar ongum. Høvuðstaðurin hevur brúk fyri eini sterkari og virkisfýsnari samgongu, sum ikki brúkar orkuna til klandur um valdstøður og um hvør kann gerast mest sjónligur komandi árini. Nú er stund at semjast.

**Sosialurin**

## Børn við serligum tørvi eiga ongan góðan er staðfest!



**LEVI MØRK**
nývaldur býráðslimur fyri Javnaðarflokkin hjá Tórshavnar Kommunu

**(Hetta lesarabræv verður hervið endurprenting við broytingum, í samband við landsfund hjá Javnaðarflokkinum)**

Børn við serligum tørvi eru slept upp á fjall frá almennari síðu, tá ið talan er um frítíðarskúlatilboð.

Hetta er ein neyðloys frá almennar síðu.

Sum er nú er, hava børn ikki krav upp á kommunalt frítíðartilboð aftaná 2. flokk, hetta er eisini galdandi fyri børn við serligum tørvi, her vísir Almannastovan til hølini hjá Javna í Gundadali.

Heldur ikki fylgir tilsvarandi játtan við, og hølisviðurskiftini á økinum eru sera vánalig.

Har eru, sum eg havi skilt, einans børn við diagnosu innan ADHD/ DAMP-økið. Her eru øll børnini í sama frítíðarskúlahøpi. Talan er um børn við autismu og børn við øðrum trupulleikum.

**Ov lág játtan til betri karmar**

Her fylgir eingin fíggjarlig játtan til betring av karmunum, sum er eitt krav, um tú skalt hava ein muna góðan kvalitet á økinum. Sjálvt um Tórshavnar kommuna roynir at fylgja við, er støðið ikki gott nokk í dag. Nei, her er nógv eftir til, at støði skal vera betri.

**Øll hava ymiskan tørv**

Foreldur skríggja um hjálp og um betri fakligt innihald, fakligt støði og betri karmar, etc, men einki hjálpir. Øll serbørn vera bólkað, sum tey eru, eins og hava sama tørv. Tú mást hyggja at tí einstaka barninum, og øll børn hava jú ymiskan tørv. Tað eru alt ov nógvar fyribilsloysnir á økinum, hvat við at finna eina verandi loysn?

**Børn og avvarðandi eru gíslar**

Nei, her vantar yvirorðnað politisk stev, har bæði kommunalir og landsins myndugleikar síggja veruleikan í eyguni og steðga øllum, sum eitur fyribilsloysir. Eg eri troyttur av øllum hesum fyribilsloysn um á hesum øki. Eg eri troyttur av fyribilsloysnum

**Hetta er ein tvørpolitisk avgerð**

Her krevst ein tvørpolitisk avgerð um, millum land og kommunu, har eg haldi, at hetta serstovnaøkið skal yvirtakast upp til 10 flokk. og har Tórshavnar kommuna fær fulla ábyrgd á økinum, og tað fíggjarliga fylgjur við.

Bleiv tagdur burtur á landsfundinum hjá Javnaðarflokkinum og av Kringvarpinum!

Einki kom fram um børn við serligum tørvi, hvørki í Kringvarpinum ella sum ein partur av niðurstøðuni frá floksleiðsluni hjá Javnaðarflokkinum í Klaksvík. So, tað sum eg kom inn á, tá ið eg helt røðu á landsfundinum hjá Javnaðarflokkinum í Klaksvík um børn við serligum tørvi, varð klipt vekk, bæði frá kringvarpinum og frá Javnaðarleiðsluni, sum ikki nevndi eitt orð um málið í teirra niðurstøðu.

Tvs hetta málið var ikki tikið við sum nakað serligt. Ja, so litið pláss verða børn við serligum tørvi raðfest í okkara samfelag í dag!

Nú eri eg valdur inn í Tórshavnar býráð, og eg fari at berjast fyri sakini.

## Lívsins vatn

**INGOLF HEINESEN**

Sat og hugdi eftir Degi &Viku tann 20/11. Í kjaksendingini aftaná, sum snúði seg um rúsdrekka, síggja vit ímillum annað eina fløsku av brennivíni. Á etikettuni stendur skrivað "Lívsins vatn". Tað fyrsta sum kom í hugan á mær, tá ið eg sá hetta,var: "Gudsspottan". "Lívsins vatn" ella "Vatn lívsins" eru orð, sum man er vanur við at hoyra í einum heilt øðrum samanheingi. Hetta úttrykk verður brúkt fleiri ferðir í Bíbliuni. Gud sigur til dømis í Op.21.6. Eg eri Alfa og Omega, upphavið og endin. Eg skal geva tí, sum tystur er, av keldu lívsvatnins fyri einki.

7. Tann, sum sigrar, skal arva hetta, og eg skal vera Gud hansara, og hann skal vera sonur mín.

Eg vil hervið loyva mær, upp á forhond at mótmæla, óansað hvat hendur við rúsdrekkalógini, at nakar stjelur hesi orð til at merkja eina brennivínsfløsku við, í okkara føðilandi Føroyum.

## Til Føroya Landstýrið

**JOEN JACOB WINTHER**
næstform. Sandoyar Sýslu Javnaðarfelag

Vit fara at mótmæla, at landsstýrið hevur í hyggju at avtaka stuðulin til Dagtilhaldini um landið.

Kommunurnar hava gjørt sínar fíggjarætlanirnir, og kemur hetta at raka okkara eldru.

Vit meta ikki, at tað er rætt, at tá sparast skal, at tað skal raka okkara eldru í samfelaginum, sum hava borið hetta landið uppi.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo
Bergur Johannesen bergur@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.